# Sálarheilsudegnum





*Framsýning var í Posthúskjallaranum. Her Ingi Sune Jacobsen, sum átti fleiri av verkunum*

og hvat so? Við einum spurnatekni í endanum.

Vælkent er, at nógv tabu og stigmatisering er kring sálarsjúka. Hetta kann gera tað trupult at fáa fótafesti aftur á arbeiðsmarknaðinum. Tað skal tæna tykkum til rós, at tit seta hetta vandamál undir ljós og leggja fram fyri okkum, hvat einstaklingar sjálvir hava upplivað og hvussu granskingin og professionella umhvørvið handfer hetta øki, ið vit øll kunnu gerast partur av.

Recovery er prosessin at koma fyri seg. Aktivt at arbeiða við sær sjálvum og aldri at geva upp. Og ikki minst at sleppa gamlari vanahugsan, eisini um viðgerð. Hetta setur stór krøv til okkum øll, skulu vit vera realistisk, men samstundis eisini optimistisk. Og hin mest optimistiska søgan, sum er úr Norra, verður søgd her í dag. Frá at hava verið sjúk í mong ár er hon í dag sálarfrøðingur og høvundur at metsølubókum um recovery – tað at koma fyri seg aftur.

Sama kunnu vit siga um virðisløntar filmar, sum við sama vinkuli byggja á veruligar lagnur. 'A Beautiful Mind' er eitt dømi. Eg skilji, at tað er henda opinleika tit leggja upp til við ársins Sálarheilsudegi. Sum borgarstjóri í høvusstaðarkommununi kann eg ikki annað enn fegnast um hesa vinkling og hetta afturvendandi átak.

Við hesum fáu orðum úr nýggju Perluni í loyniliga smugglarahjartanum í Havn, vil eg lýsa Sálarheilsudagin 2009 at vera opnan og alment settan."





*Nýggja Perlan tikin í brúk*




*Sálarheilsudagurin var hildin við trapputingi í Miðlahúsinum. Her Aksel Johannesen og Rósa Samuelsen, landsstýrisfólk og orðstýrarin Svenning á Lofti*



*Trapputing í Miðlahúsinum*